# Samanspæl

**GORDON EJDESGAARD**
fíggjarstjóri í Grønlendska Heimastýrinum



”Hvat skal mann gera nú tvær hugsanir stoyta saman, spurdi Knút. - Annar parturin verður jú taparin og dømdur til glatan. - Mann skal ikki stoyta saman svaraði Æðan, - mann skal hittast. - Er tað ikki júst tað vit gera? Spurdi Knút .- Kanska, segði Æðan”.

Orðini eigur Kurt L. Frederiksen: Edderfuglens rejse. En roman om Knud Rasmussen og den 5. Thule-ekspedition.

Kom at hugsa um skaldsøguna, nú vit hava fingið eina nýggja dimensión/konflikt innan føroyskan politikk. Vit hava vinstra og høgra, vit hava fyri og í móti loysing og nú eisini fyri og í móti at nýta kristindómin sum grundarlag fyri lóggávu okkara.

Nú kann henda nýggja dimensiónin tykjast at vera ein dimensión uttan nakra andsøgn ella mótdimensión. Lættari er við vinstru og høgru. Søguliga er eingin ivi um, hvat er hvat. Fyri og móti loysing básast á sama hátt. Men nýggja dimensiónin er meira trupul í so máta. Tí hvat er mótsetningurin til tað kristiliga? Mær vitandi er eingin mótsetningur. Onkur vildi sagt: antikrist. Men her gerst jú spinnandi galið við argumentatiónini. Onkur annar vildi sagt, at talan er als ikki um eina dimensión. Tí nógv tann størsti parturin av okkum eru kristin. Annar vildi sagt, at tað er líkamikið, hvat ein sigur um hesi viðurskifti. Tað eru gerningarnir, sum eru avgerandi.

Er tað síðsta, eg nevni rætt, er í grundini einki at óttast. Tí so er kristiligi politiski boðskapurin her at skilja sum annað politisk tos. Og ikki annað. Praksis vil so vísa, um okkara krisitligu eru nógv øðrvísi enn somu menn aðrastaðni. T. d. í Italiu, Týskalandi ella USA. Tíverri kunnu hesir ikki sigast at vera nakað framúrskarandi dømi um rættvísi. Ella manglandi korruptión. Kanska eru okkara frægari. Spurningurin er aktuellur. Hví eru væl øll greið yvir.

Kann ein politisk hugsjón selja seg upp á kristiliga grundsjónarmiðið? Ella er politiska hugsjónin ov veik til veruleikan. Her skal kryddrast við kristindómi.

At vit hava fingið eitt kjak um hesi viðurskifti vísir, at demokratiið eisini er til her. Hóast vit snáva, har snávast kann. Men tað skal dirvi til bæði at vera fyri og ímóti í hesum kjaki. Í so máta er tað gott at siga sum er. Hvar ein stendur politiskt. Um tað so kann brúkast til nakað, er ein heilt onnur søga. Vit hava fyrr sæð dømi um at boða kærleikan við hóttan, konfrontatión og báli.

Talan kann vera um eina døgnflugu. Og so er livitíðin avmarkað. Politisk innlit sigur, at flugan ger seg meira óhugaverda, enn hon er. At brúka kristindómin sum politisk mótafenomen mann heldur ikki fara at ganga her. Hartil eru boðberanna andaligi habitus ov lágur.

Fyri at venda aftur til Knút og Æðuna, so er hovsemi (at hittast) frægara leiðin enn konfrontatiónin/samanstoyturin. Tað er ómetaliga lætt at gerast ósamdur, um ein vil. Tað skal bert tann eini parturin til at gera ósemju. Semjan finst við hovsemi og virðing fyri øðrum hugsjónum. Semja og fólkaræði eru tvinnandi partar av mentan okkara. ”Mann skal ikki stoyta saman”, sum Æðan segið. Men Knút hevði kanska rætt, tá hann spurdi:” Er tað ikki júst tað vit gera? ”.

Nú kann ein siga, at vit praktisera politikk, sum vit sjálvi meta rætt at vera. Vit fylgja okkara samvitsku. Og hetta verður gjørt. Ein kann so spyrja, um hetta er til frama fyri samfelagið sum heild. At hvør tingmaður fylgir sannføring síni. Hetta ger støðuna fløkta, men er ein partur av skipanini. Mær vitandi er eingin valdur á ting, tí hann trýr á Guð. Hvør ger ikki tað í størri ella minni mun.

Her kemur ein í rasshaft við argumentatiónini. Tað sum higartil hevur verið raðfest høgt politiskt glíður afturum til frama fyri einum kjaki, sum eingin endi er á og eingin loysn finst á. Og skal finnast á, kundi eg lagt afturat. Realpolitikkur og trúgv eru ikki mótsetningar (andsagnir). At trúgv ella manglandi trúgv er ein partur av grundarsteininum hjá tingfólki, er teirra sak. Realpolitikkur byggir í roynd og veru á hesi viðurskifti -henda veruleika.

# Samgongan rekur fyri vág og vind

**JASPUR VANG**
Tvøroyri



Sum samgongustevið er vorðið nú seinast í valskeiðinum og soleiðis sum landspolitikararnir føra seg framm í sjálvdrátti, er og verður løgtingsarbeiði bæði tilvildarligt og óvirðiligt til eftir komandi løgtingsval. Eftir eitt annnars væleydnað valskeið eigur løgmaður tí at útskriva løgtingsval.

**Løgtingið skal viðgera og taka støðu til viðkvom og týdningarmikil mál næstu mánaðarnar. Talan er m.a. um**

- málið um vallógarbroytingar,
- broytingar í útlendingalóggávuni,
- broytingar í fiskivinnulóggávuni,
- fíggjarlóg fyri 2008 og í tí høpi m.a. spurningin,
- hvar í landinum landsbúskapurin er ovurupphitaður og
- hvat skal gerast fyri at tálma ovurupphitingini,
- umframt málið um skrásett parlag, sum nú, soleiðis sum mong okkara eisini væntaðu, tykist koma undan kavi í kjalarvørrinum eftir broytingarnar í grein 266b í revsilógini.

Nevndu mál hava uppiborið seriøsa og virðiliga viðgerð og eru tí ikki skikkað at viðgera og enn minni avgreiða á løgtingi, nú valstríðið av álvara er byrjað og tingmenn av øllum alvi umvegis fjølmiðlarnar berjast fyri politiska lívi sínum. Nakrir teirra eru fyri einhvønn prís til reiðar at kollvelta vallógina í einari handavending. Hvørt hesir hava varðhugan av, at valdømini, har teir eru uppstillaðir og valdir, ikki eru nøgd við politisku avrik teirra og at talan tí er um gerrymandering (at tillaga vallógina til egnan fyrimun), soleiðis sum róð hevur verið uppundir í fjølmiðlunum, tykist sannlíkt.

**Nógv fingið av skafti**

Breiða samgongan megnaði við táverandi fíggjarmálaráðharra Bárði Nielsen á odda at seta neyð-uga ferð á aftur føroyska búskapin og skapa framburð, eftir at fullveldissamgongan slitnaði. Nú, tað er neyðugt, hevur sitandi fíggjarmálaráðharri Magni Laksafoss lagt upp til veruliga langsiktaða búskaparstýring og er farin undir arbeiðið at tálma ovurupphitingini av landsbúskapinum. Eisini valdar friður á ríkisrættarliga økinum, eftir at breiða samgongan fyrst í valskeiðinum samráddi seg til sættis við ríkismyndugleikarnar. Harumframt eru mong onnur týdningarmikil mál avgreidd. Breiða samgongan kann tí við góðari samvitsku leggja frá sær, nú støðan er vorðin, sum hon er.

**Loyaliteturin í samgonguni reyk í samband við 266b**

Tá lítisverda málið um nú viðtiknu broytingarnar í grein 266b í revsilógini var til viðgerðar og sum ikki einaferð, av fjølmiðlunum bleiv blást upp til nakað, tað als ikki var, megnaði samgongan ikki at standa ímóti og finna felags stev. Sjálvur samgonguleiðarin hoknaði í kongunum, gav eftir fyri fjølmiðlatrýstinum og royndi at gera seg sjálvan til talsmann fyri tað av andstøðuni frammsetta uppskotið. Harvið reyk loyaliteturin í samgonguni og kundi løgtingsformaðurin nú nakrar mánaðar seinni, sjálvt um hann er partur av parlamentariska grundarlagnum undir breiðu samgonguni, uttan um samgonguna og í sjálvdrátti, men eftir øllum at døma eftir avtalu við løgmann og ávísar aðrar tingmenn, loyva sær at leggja framm málið um at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Í skrivandi stund er tað seinasta nýggja, at Fólkaflokkurin í sjálvdrátti ætlar at leita sær stuðul hjá andstøðuni í sam-band við yvirtøku av nøkrum málsøkjum.

**Avtalan millum samgonguflokkarnar um vallógarbroytingar**

Løgmaður vil vera við, at avtala er gjørd millum samgonguflokkarnar um, at vallógarbroytingin, sum fer at gera Føroyar til eitt valdømi, ikki skal fáa gildið, fyrr enn efter komandi løgtingsval, men at miðstaðarøkið afturfyri - og sum plástur á sárið - skal fáa ein tingmann afturat til komandi løg-tingsval.

Onkur løgtingslimur sigur seg ikki kenna til nakra avtalu, meðan aðrir samgongulimir siga seg als ikki vera partar av avtaluni og tí fara at atkvøða fyri uppskotinum hjá løgtingsformanninum, soleiðis sum tað fyriliggur og soleiðis, at Føroyar gerast eitt valdømi beinan vegin.

Hvør sigur satt ella ósatt um avtaluna, ella um ein slík í heila tiki kann sigast at fyriliggja, er ilt at meta um. Undir øllum umstøðum kann í hvussu so er staðfestast, at samgonguavtalan er virðisleys, álitið millum samgongutingmenn burtur og samgongan harvið óarbeiðsfør.

Snøgt sagt, so er samgongan í upploysn. Stundin er tí komin til at lata veljaran tala, reinsa luftina og stinga út í kortið av nýggjum.

# Fyri fyrstu ferð sleppa tingmenn at atkvøða eftir sannføring síni

**POUL MICHELSEN**



**Tingformaðurin hevur allan rættin**

Føroyar, sum eitt valdømi er ikki eitt samgongumál. Tað hevur tað ongantíð verið og verður tað heldur ikki nakrantíð.

Hóast ótalligar royndir eru gjørdar gjøgnum tíðirnar - bæði frá andstøðu og frá samgongu – um at fáa eina meira demokratiska og rættvísari valskipan, so eru vit ongantíð komnir bara nær eini loysn. Verandi valskipan tryggjar snøgt sagt einum og hvørjum minniluta rættin til at halda uppá órættin.

Minnilutin er nevnliga altíð so stórur - í øllum samgongum - at hann megnar at spreingja eina og hvørja samgongu.

Tríggjar royndir eru gjørdar bara í hesum samgonguskeiðnum. Sjálvstýrisflokkurin hevur roynt tvær ferðir og landsstýrismaðurin Jacob Vestergaard einaferð. Alt til onga nyttu. Umframt hetta veit eg, at landsstýrismaðurin innanveggja í samgonguni hevur gjørt fleiri royndir. Men alt segði tað sama. Minnilutin heldur kvørkratak um samgonguna.

Samgongan og leiðari hennara LØGMAÐUR hevur í hesum málið spælt fallit – og eigur nú tí at halda fingrarnar vekk.

Tí málið vendir rætt nú. Tingformaðurin, sum varðar av tinginum og tinglimum, hevur í samráð við allar partar givið málinum eitt neutralt útgangsstøði, og tryggja at tinglimir – fyri fyrstu ferð – sleppa at nýta sín demokratiska rætt at atkvøða eftir bestu sannføring.

**Sera væl valt tíðspunkt – og kann ikki verða betur**

Lat ongan iva vera um, at floksformenn samgongunnar saman við løgmanni – umvegis eitt smart broytingaruppskot – enn einaferð royna at forkoma uppskotinum um Føroyar sum eitt valdømi.

Eydnast hetta teimum, má ein siga, at væl var telvað. Ein minniluti, sum klárar at stilla næstan 2/3 av tinginum og 2/3 av føroya fólki skák mát, dugir sítt politiska handverk.

Spurningurin er bara, um vit skulu loyva løgmanni og floksformonnunum at sleppa at gera hetta.

Kenna vit, sum stuðla løgtingsformannin, okkara politisku ábyrgd, eiga vit at tryggja, at uppskotið hjá honum verður samtykt.

Uppskotið hjá løgtingsformanninum er eitt sera demokratiskt og væl grundað uppskot. Allir føroyingar verða nú javnsettir, allar atkvøður telja við, og javnvágin millum kvinnur og menn vird.

At málið verður framlagt nú, er heilt einfalt einasti møguleiki. Valskeiðið er enda, og tey mál, sum ætlanin var at fremja, eru so gott sum komin undir land.

Kom uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi í byrjanini av valskeiðinum, so var samgongan rokin straks. Trý uppskot um at betra valskipanina hava sum nevnt ligið á tingborðinum í hesum valskeiði. Og øll sópaði av borðinum við hóttanum um at spreingja samgonguna.

Hetta. hóast at samgonguskjalið greitt sigur, at nýggj og rættvísari valskipan skal finnast.

**Dragið ikki stríðið inn í næstu samgongu**

Tað er ikki rætt at samtykkja at útseta avgerðina um Føroyar sum eitt valdømi til næsta val. Hetta ger málið onki betri. Tvørturímóti so verður komandi val eitt satt ragnarok og bert satt hugflog kann ímynda sær, hvussu næsta samgonga skal kunna fáa nakað sum helst av skafti. Tá verður ikki bert talan um, at henda samgongan gongur til grundar, men eisini tann næsta.

Einasta rætta er at stuðla uppskotinum hjá løgtingsformanninum. Løgtingsformaðurin hevur – við uppskotið sínum – givið tingmonnum frælsan møguleika at atkvøða um eina valskipan, sum stórur meiriluti av tinglimum hava staðið aftanfyri í nógv ár.

Stórur meiriluti av føroyingum stuðla eisini uppskotinum – minnist til tað.